EB/Streymur – Skála 1-0 (0-0)

# Skála misti á stokkinum

**Eftir fyrsta dystin í 1. deild nakrantíð iðra skálamenn seg grønar um mista stigið á Mølini. Ein misskilj- ing í verjuni hevði við sær, at Pacek kundi avgera dystin fimm minuttir fyri leiklok**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

EB/Streymur hevði eitt sera gott kappingarár í fjør, tá liðið hóraði undan við góðum skoðsmáli frá eygleiðarum. Liðið endaði triðaftast, men spælið var mangan gott, og EB/Streymur argaði fleiri av teimum stóru liðunum.

Skála er á nýggjum beiti og skal fyri fyrstu ferð royna seg í bestu deildini. Hesin fyrsti dysturin var tó ein uppliving, sum leikararnir heldur vilja gloyma, tí EB/Streymur fekk einasta málið í teimum seinastu minuttunum eftir eina verjuvillu, sum ikki skal henda.

Trygvi Mortensen hevði til henda dystin flutt Andrzej Pacek fram í álopið, eftir at hann fyri tað mesta hevur spælt sum verjuleikari, ta tíðina hann hevur verið í Føroyum. Hann kom tó væl frá uppgávuni og fekk sigursmálið.

Pacek var á blettinum, tá ein langur bóltur verður sendur inn í brotsteigin hjá Skála. Máverjin Eugen Voda kemur út eftir honum, og Dánjal Hansen er eisini staddur hjá bóltinum. Tað sá ógvuliga vandaleyst út, men eingin teirra tók bóltin, og tá sníkti Pacek seg ímillum og skeyt bóltin uppum málverjan á tvørstongina og inn. Hvør hevði ábyrgdina av málinum er ilt at siga, men málverjin má kanska taka tað á sín kappa.

Hetta var ein sera dyggur smeitur fyri skálamenn, eftir at teir høvdu kempað manniliga á útivølli og hildið málið reint. Skála hevði eisini sínar møguleikar at skora, men áleypararnir høvdu ikki hepni við sær.

### Skála var væl við

Tað var tó Skála, sum hevði tann fyrsta stóra málmøguleikan í dystinum, og hetta var ein møguleiki, sum ikki skal brennast. Eftir eitt innlegg kom Bogi Gregersen at standa væl fyri við handaru stong. Hóast hann stóð á málteiginum megnaði hann ikki fáa bóltin framvið Gunnari á Steig, sum aftur í ár verjir málið hjá EB/Streymi.

Skála var ógvuliga væl við ta fyrstu løtuna av dystinum, men sum hálvleikurin leið, var tað alt meira heimaliðið, sum fekk leikliga yvirvág. Lítil ivi var um, at Skála fór á vøllin fyri at verja tað eina stigið og síðani royna seg við skjótálopum, men tað eydnaðist ikki at verja stigið. Skála hevur eitt sera ungt lið, og bara tveir spælarar eru eldri 24 ár, og tí eru fleiri leikarar, sum ikki hava nakrar royndir frá fótbólti á 1. deildarstøði. Í dag mátti venjarin klára seg uttan Ronnie Hansen og Aleksandur Johansen, sum sótu uttanfyri við leikbanni.

EB/Streymur flutti spælið oman á hálvuna hjá Skála, og nakrir møguleikar spurdust eisini burturúr. Hans Pauli Samuelsen hevði ein risastóran møguleika, tá hann kom at standa væl fyri tætt undir málinum. Skotið fór to dygst framvið handaru stong. Knút Vesturtún hevði eisini ein høvdara, sum rakti tvørtræið.

Annars vóru liðini hampuliga jøvn fyri steðgin, men tá dómarin bríkslaði í gongd aftur, var tað EB/Streymur, sum hevði yvirvág í spælinum. Skála hevði lítið at bjóða uppá eftir steðgin, og hevði einans eitt skot á málið hjá Gunnari.

EB/Streymur skapti nú fleiri málmøguleikar. Sorin Anghel var sekur í at brenna tann størsta. Í fyrstu atløgu høvdaði hann bóltin á tvørstongina. Bólturin støkk útaftur til Sorin, og tá málverjin lá í málinum, var lag á manni at seta bóltin í netið. Men skotið hjá rumenanum fór uppum.

Júst tá tey flestu høvdu sligið seg til tols við einum javnleiki, lá Pacek framvið. Hann hevði eina langa tá á bóltinum, tá málverjin og verjuleikarin ikki samskiftu á nøktandi hátt. Hann skoraði sostatt einasta málið í dystinum.

Hetta mundi koma dátt við hjá skálamonnum, tí tað hevði verið hugaligari at farið av vøllinum við einum stigi. Sagt verður av Eiði, at EB/Streymur skapti fleiri málmøguleikar og serliga í seinna hálvleik hevði liðið greiða yvirvág. Málið kom tó eftir eina verjuvillu og ikki eftir ein av hinum stóru málmøguleikunum.

### Dysturin í tølum:

**EB/Streymur – Skála 1-0 (0-0)**
1-0: Andrzej Pacek

EB/Streymur: Gunnar á Steig – Hallur Jacobsen, Knút Vesturtún, Alfred Jacobsen, Kristian Carlsson – Ronnie Samuelsen, Jákup Martin Joensen, Marni Djurhuus, Hans Pauli Samuelsen – Sorin Anghel, Andrzej Pacek
Skála: Eugen Voda – Bent Djurhuus, Pauli Poulsen, Dánjal Hansen, Arnold Berg – Marius Joensen, Kári Nielsen, Rúni Rasmussen, Pauli Hansen – Jonhard Frederiksberg, Bogi Gregersen



*Andrzej Pacek og Pauli Poulsen dystast um bóltin. Pólverjin skeyt sigursmálið í sigrinum hjá EB/Streymi á Skála. Málið kom eftir verjuvillu bert fimm minuttir áðrenn dystarlok*
*Mynd: Finnur Justinussen*



*Dysturin á Mølini sunnudagin var tættur. Tað vóru tó sundalagsmenn, sum drógu longra stráið, tá dómarin bríkslaði dystin av*
*Mynd: Finnur Justinussen*



# B68 kendi ikki sína vitjunartíð



*Anders Nygaard fekk einki mál í dystinum móti GÍ. B68 kendi ikki sína vitjunartíð, og tað gav GÍ møguleikan at fáa annað stigið heimaftur av Toftum*
*Savnsmynd*

**Eftir leiðslumálið misti heimaliðið á Svangaskarði takið, og so stríddi illa mannaða GÍ seg til eitt stig**

B68–GÍ
*Jóannes Hansen*

Toftamenn vilja fegnir vera uppií har, sum tað gongur fyri seg. Tað vil siga í stríðnum um FM heitið og Europa Cup plássini. Fyrsta treytin, at tað skal bera til, er at vinna heimadystirnar.

B68 fekk ikki meiri enn 1–1 í oyggjauppgerðini í fyrsta umfarinum ímóti gøtumonnum. Tá hugsað verður um fyritreytirnar, so kann ikki annað sigast, enn at GÍ kom væl frá fyrstu royndini. Súni Fríði Johannesen var so mikið skaddur, at hann fekk ikki spælt. Popczynski var einsamallur í álopinum. Hann tóktist vera so mikið illa fyri, at hann ikki spældi meiri enn við hálvari ferð, og í vinstra borði var sera lítið veiggj í álopspartinum hjá GÍ.

Poul Henning Jacobsen hevur ikki vant so nógv. Hann var í 1. hálvleiki á miðvøllinum. Eftir steðgin kom veteranurin Jóan Petur Olsen, sum hevur spælt lítið seinastu árini, og sum bara hevur vant tvær ferðir í ár, inn á verjukenda miðvallarplássið. Hann hevur royndirnar, hann hevur góða grundkonditión, og hann er bólttryggur.

Tað sigst, at Súni Olsen og Henning Jarnskor skulu spæla við GÍ. Høvdu teir verið við á Svangaskarði, so høvdu fyritreytirnar verið til staðar fyri uppaftur betri úrtøku til gestirnar.

### B68 bragdligt

B68 var omaná fyrstu løtuna. Tað riggaði væl á sentrala miðvøllinum, har Fróði Benjaminsen og Jann Ingi Petersen høvdu gott tak á. Marlon Jorge bjóðaði seg til í høgra borði, og tað var tyngd í álopinum, har Arnold Joensen var høgru megin og Øssur Hansen vinstrumegin. Anders Nygaard var sentralur álopsspælari. Hann hevði alla tíðina sera raska Bartal Eliassen ímóti sær.

B68 kom á odda eftir gott álop, tá eitt korter var farið. Teir fangaðu GÍ uppspæl um miðstrikuna í høgru. Øssur Hansen sneiddi framvið tveimum, spældi eitt tvey við Anders Nygaard, kom í brotsteigin í vinstru og smekkaði flatt í handara síðunetið.

Eftir leiðslumálið var tað fleiri ferðir um reppið, at støðan uppstóð, sum kundi havt økta leiðslu til heimaliðið við sær, men tað eydnaðist ikki, og sum 1. hálvleikur leið, tók trýstið at linka.

### Troyskir gøtumenn

GÍ hevur nakrar sera støðugar lyklaspælarar. Teir kenna ábyrgd, og teir megna at bera liðið langt. Her verður hugsað um Magna Jarnskor og Sámal Joensen á miðvøllinum, Gidek, sum var verjukendur miðvallari fyrra umfarið, og sum stuðlaði einsamalla álopsmanninum eftir stegðin, Bartal Eliassen í miðverjuni og so Hallur Hansen, sum er sera tryggur millum stólparnar.

Síðstu løtuna undan steðginum vóru fleiri ábendingar um, at heimasigurin fór ikki at verða lættvunnin. Og beinanvegin eftir steðgin vóru fleiri spentar støður frammanfyri B68 málið. Eitt nú tvær frísparksstøður á brotsteigarmarkinum. Gidek royndi báðu ferðirnar ímóti málinum. Í tí fyrra førinum hálvbjargaði tryggi málverjin, Michal Kokoszanek, sera væl, og í seinna førinum fór skotið væl omanfyri tvørtræið.

Útjavnandi málið skoraði Gidek. Eftir uppspæl í høgru, kom hann í brotsteigin, spældi eitt tvey við Popczynski og var á rangstøðumarkinum (kanska var hann rangstaddur), tá hann kom leysur mitt fyri og sendi framvið landsmanninum í B68 málinum.

Síðstu løtuna var talan meiri um stríð, enn tað var um spæl. Nærdystirnir vóru nógvir, og onkra ferðina var tað mest sum áfast. Gøtumenn vóru nøgdir við javnleikin. Kanska iðraðu teir á heimaliðnum seg um, at teir ikki høvdu fingið fulla úrtøku, men teir kendu ikki sína vitjunartíð fyrsta hálva tíman, og tí kundi heildarmetingin ikki vera nógv øðrvísi, enn at tað stóð á jøvnum.

B68: Michal Kokoszanek – Oleif Joensen, Hans Fróði Hansen, Messias Perreira – Marlon Jorge, Jann Ingi Petersen, Fróði Benjaminsen, John Heri Dam – Arnold Joensen, Anders Nygaard, Øssur Hansen
GÍ: Hallur Hansen – Áslakur R. Petersen, Bartal Eliassen, Leivur Hansen, Magnus Skoralíð – Poul Henning Jacobsen, Zdzislaw Janik, Sámal Joensen, Magni Jarnskor, Hans Pauli Petersen, Krzystof Popczynski

2.deild: Sumba-VB 3-2 (2-0)

# Sumbingar væl frá byrjan

**Sumbingar vunnu eina sera tætta grannauppgerð móti vágbingum. Sumba dró longra stráið, tá Eirikur Joensen fekk vinnandi málið**

FÓTBÓLTUR
*Bjartur Nolsøe*

VB er nýtt lið í 2. deild. Frammanundan kappingini varð roknað við, at VB verður eitt av teimum liðunum sum skulu berjast fyri at sleppa undan niðurflyting.

Sumbingar haraftur ímóti hava vónir um eina plasering í ovaru helvt. Sumbingar vóru tískil favorittar á heimavølli í fyrsta dystinum í hesum kappingarárinum, móti teimum næstbestu úr Vági.

Og tað sást eisini beinanvegin at Sumbingar ætlaðu at vinna ein greiðan sigur. Teir løgdu hart út og løgdu trýst á vágbingar.

Hetta gav eisini úrslit tíðliga í dystinum, tá Bergur Winther kom at standa leysur og skeyt bóltin í máli til 1-0.

Vágbingar royndu at svara aftur og komu eisini fram til onkrar góðar málmøguleikar. Men tað vóru sumbingar sum fingu næsta málið. Hesuferð var tað Eirikur Joensen sum skoraði. Henda støðan helt sær til hálvleik.

Hvat vágbingar hava tosað um í hálvleikinum er ilt at siga, men teir komu í hvussu út aftur við einum heilt øðrum vilja til seinna hálvleik.

Tað gingu bert heilt fáir minuttir so hevði Birgir Jørgensen minkað um munin til 2-1. Hetta setti veruliga ferð á VB, og lítla løtu seinni fingu teir sítt næsta mál og so stóð 2-2. Aftur var tað Birgir Jørgensen sum skoraði.

Hetta var ein rættiligur hvøkkur sum VB gav sumbingum. Eftir at hava havt eina trygga leiðslu í hálvleikinum, stóð nú knapliga á jøvnum og dysturin kundi fara báðar vegir.

Bæði liðini stríddust nú fyri at fáa sum frægast burturúr. Sumbingar vildu helst hava 3 stig, meðan vágbingar kundu liva við javnleiki.

Og tað eydnaðist Sumba at fáa eitt mál aftrat, sum skuldi vísa seg at blíva sigursmálið. Eirikur Joensen royndi seg langt úti frá við einum góðum skoti, og bólturin endaði í málinum. Eitt gott mál verður sagt.

Vágbingar royndu av øllum alvi at koma inn aftur í dystin, men sumbingar hildu fast. Sostatt fingu sumbingar tann væntaða sigurin móti uppflytaranum úr Vági.

Dysturin gevur tó VB mót uppá, at tað væl kann lata seg gera at standa seg í næstbestu deildini. Tað koma onkrir lættari dystir enn hesin.

### Dysturin í tølum:

**Sumba-VB 3-2(2-0)**
1-0: Bergur Winther
2-0: Eirikur Joensen
2-1: Birgir Jørgensen
2-2: Birgir Jørgensen
3-2: Eirikur Joensen